VIÐMERKINGAR

# Kommunuskattur og barnafrádráttur



**Gunnar Mohr**
*valevni til Tórshavnar býráð*

Í fleiri ár hevur kommunuskatturin í Havnar kommunu verið 19%, kirkjuskatturin 0,25% og barnafrádrátturin 3.0 krónur.

Viðvíkjandi kommunuskattaprosentinum er at siga, at 26 av 48 kommunum hava lægri prosent enn Havnar kommuna. T.d. eru tíggju kommunur við 16% og aðrar tíggju við 17 ella 18 %.

Hinvegin eru 11 kommunur við hægri kirkjuskatti enn tey 0,25 prosentini, ið Havnar kommuna krevur.

(Kollafjarðar kommuna, 0,4%)

Hyggja vit so eftir barnafrádráttinum, síggja vit, at 6. hvør kommuna hevur størri barnafrádrátt enn Havnar kommuna.

Eingi ivi um, at komandi býráð, má taka stig til at fremja neðugar broytingar í skattaprosentinum og barnafrádráttinum longu í 2001.

Ein hóskandi broyting kundi sæð soleiðis út :

Kommunuskatturin 18%

Kirkjuskatturin 0,4%

Barnafrádrátturin 4000 ella 5000 krónur.

Alt er ein hjálp! Hjá foreldrum við børnum verður ein slík lækking í skattinum og hækking av barnafrádráttinum góð hjálp í tí dagliga húsarhaldinum.

Sunnur politikkur í sunnum býi.

# Píkaørskapur



**Johan Mortensen**
*Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum*

Tað er ótrúligt at framvegis er loyvt at brúka píkar. Vit hava ídag, seinast í oktober, ein meðalhita uppá 7-10 gr og fólk eru longu farin at fáa sær píkar í dekkini, gud-for-barme-segtú meg fyri vanahugsan.

Vit hava ikki tørv fyri píkum í Tórshavn. Býráðið skal gera sína skyldu sum er árla á morgni at grava tá kavi er lagstur, at salta vegirnar og at sópa upp »putursukurið«. Tað er sjálvdan hált longur enn tveir teir fyrstu tímarnar á morgni og kann hetta fyribyrgast við skinsamari kavarudding.

Eisini hava vit okkara býarbussar so tað ber til at lata bilin standa um tað, hendingaferð, ikki er koyrandi hjá privatbilum.

Tað eru nógv góð argumentir fyri at avtaka píkarnar so eg skal ikki endurtaka tey. Tó vil eg gera vart við at píkarnar kosta Býráðnum milliónaupphæddir í asfalti og viðlíkahaldi av vegkervinum.

Tjóðveldið vil avtaka píkarnar.

# Kaldbak, ein útjagari í Tórshavnar kommunu



**Álvur Kirke**
*Valevni fyri Miðflokkinum til býráðsvalið í Tórshavnar kommunu*

Nú eru mong ár síðani, eg fyrstu ferð var í Kaldbak.

Tá vóru tveir handlar í bygdini. Strandferðslan hevði avgreiðslu, og posthús var eisini, til fyri fáum árum síðani.

Nú er eingin handil. Handilin er í Havn, Strandferðslan er í Havn, og Posthúsið er í Havn. Stytsti vegur til handils er at fara til Havnar ella til Kollafjarðar. Tey flestu fara til Havnar, tí har eru so nógvir handlar, og har er so nógv annað.

Postbilurin kemur 5 dagar um vikuna, og tað virkar væl hjá teimum, sum eru heima um dagin. Men har, sum eingin er heima, er hetta eitt sindur keðiligt.

Men, líka mikið, – hví skal alt til Havnar? Tað er ikki so liviligt í bygdini, tá vit hvørki hava handil ella posthús.

Eg havi hoyrt, at hetta er gjørt fyri at spara, – men tað er ein undarlig sparing! Fyrr kom strandfaraskipið við og eftir ferðafólki, vøru, posti og mjólk. Alt sama túr.

Nú kemur ein 50 pers. bussur nakrar ferðir um dagin við og eftir nøkrum fáum ferðafólkum, ein annar bilur kemur við og eftir posti, aftur ein annar bilur kemur við og eftir farmi, og so kemur ein eftir mjólk.

Um nú onkur í Kaldbak hevði hug at koya rutu, so haldi eg, at besta loysnin hevði verið, at viðkomandi slap at koyra. Hann kundi so koyrt ferðafólk, farm og post.

Um morgunin skuldi hann koyrt børnini til Eysturskúlan, og ikki sum nú, sett tey av í SMS.

Og so kundi sami persónur havt avgreiðslu fyri Strandferðsluna og eisini havt posthús. Og allarbest, um hann eisini kundi havt handil. Hetta ber til, um vilji er til tess, og hetta skapar trivna í bygdini.

Miðflokkurin vil arbeiða fyri slíkari loysn.

# Jóannes Patursson fyrsti formaður fólkafloksins



**Bjarti Mohr**
*Valevni hjá fólkaflokkinum*

Tá ið stovnarnir av Fólkaflokkinum høvdu valt leiðsluna var Jóannes Patursson fyrst valdi formaður.

Jóannes Patursson var virkin innanfyri nógvar partar av samfelagslívinum. Hann yrkti sálmar og sangir. Hann hevði eina hugsjón um føroyskan landbúnað og vinnulív. Hann vildi hava føroyskt mál innan skúlagátt og skúlan bygdan á kristna grundstøði í fólkinum.

Sjálvandi sigur onkur kanska. Men hesi viðurskifti komu ikki uppá pláss av sær sjálvum – tey komu uppá pláss tí fólk sum Jóannes Patursson og hansara felagar bardust fyri teimum.

Hugburður Jóannesar er framvegis galdandi í Fólkaflokkinum. Hesin hugburður er fyrst og fremst merktur av at Fólkaflokkurin vil taka ábyrgd í samfelagnum og Fólkaflokkurin torir at standa í andglettinum.

Í meira enn 60 ár hevur Fólkaflokkurin verið við til at lagt lunnar undir føroyskt ivnnulív sum hevur skapt arbeiðspláss til túsundtals føroyingar. Fólkaflokkurin hevur sett fleiri sosialar skipanir í verk m.a. eru flestu barnagarðarnir í Havn bygdir undir leiðslu Fólkafloksins umframt nógv onnur tiltøk innan barna- og eldrarøkt.

Tað er umráðandi fyri høvuðsstaðarøki at vit fáa ein sterkjan fólkaflokk valdan inn í Tórshavnar býráð.

Vinarligast at x við lista A – Fólkaflokkin og hjálp okkum at gera høvuðsstaðarøkið til etit gott pláss at búgva í.

# Meirilutin ræður



**Andras L. Samuelsen**
*valevni á lista B til Tórshavnar býráð*

Nógv lond og kommunur hava fólkaræði. Fólkaræði kann fremjast við, at meirilutin ræður. Í flestøllum norðurlendskum nevndarhøpi er vanligt at nýta konsensus, ið merkir, at øll umboðini skulu verða samd, áðrenn eitt mál er liðugt viðgjørt.

Eftir mínum tykki eiga summi høvuðsmál eisini at avgerast við konsensus.

Eitt tílíkt mál er Tórsvøllur. Sitandi býráð hevur ábyrgdina av, at okkara høvuðsstaður kanska ongantíð fær eitt stadion. Hetta hendi, tá ið tað avhendaði avgerðarrættin til Tórsvøll til privat fótbóltseldhuga fólk.

Upprunaætlanin við Tórsvølli var, at hann skuldi verða eitt stadion, men fótbóltseldhugafólkini megnaðu at broyta hesa ætlan til bert at fata um enn ein fótbóltsvøll.

Tað eru fá mál, ið so nógv fólk hava úttalað seg um, sum Tórsvallarmálið; harímillum allir skúlastjórar í kommununi. Eftir mínum tykki umboðaðu hesir øll skúlabørn og -ungdóm í kommununi, men heldur ikki teirra inniliga áheitan rein við. Hetta stadion kundi verið leikvøllur hjá uppvaksandi ættarliði, men endaði við at verða ein marglætisfótbóltsvøllur, sum verður nýttur 6 til 8 tímar um árið.

At Føroya landsstýri eisini stuðlaði hesi avgerð fíggjarliga, vísir, at eisini tað gekk ímóti fleiri borgaraynskjum og ynskinum um, at okkara høvuðsstaður skal hava eitt landsstadion. Ein dáragerð fyri okkara høvuðsstað og land.

Vit eru øll skattgjaldarar, og tá ið ein so stór fjøld av borgarum vísir á, at býráðið er farið skeivt í einum máli, eigur at verða steðgað á og umhugsað ætlanina av nýggjum. Um Tórshavnar kommuna bíðaði eitt ár ella tvey afturat við Tórsvølli, hevði ikki gjørt mun.

Aðalmálið hjá einum býráð er at hava nøgdar borgarar og ikki at spjaða hesar í tveir partar, bert tí annar ikki hugsar soleiðis sum einhvør sitandi samgonga; ei heldur at trumla eitt mál ígjøgnum, bara tí meirilutin er fyri tí.

Verði eg ein av teimum, sum skulu mynda komandi býráð, fari eg at mæla til vanligt skynsemi, semjusøkjandi avgerðir í tílíkum málum og annars seta teir yngru og eldru borgararnar fremst, tí gongur teimum væl, gongur eisini okkum væl.



VIÐMERKINGAR

# Eldraforsorgin ein sorgarleikur



**Hans Jákup Simonsen**
*valevni javnaðarfloksins til Tórshavnar býráð*

Eldraforsorgin er í dag ein sosialur sorgarleikur í kommununi. Nógvar frásøgnir eru um gomul, ið ikki eru før fyri at klára seg sjálvi, og sum ikki fáa ta hjálp, tey hava fyri neyðini. Heimahjálpin er spard inn á bein. Bíðilistin til tey fáu ellis- og røktarheimini í kommununi er langur, og tey avvarandi eru ofta í einari sera trupplari støðu.

Tórshavnar kommuna eigur tí at streingja á landsmyndugleikarnar, fyri at fáa yvirtikið eldraforsorgina í kommununi sum skjótast. Fíggjarkarmurin, ið er tengdur at eldraforsorgini, skal sjálvsagt fylgja við.

Flest eldri fólk trívast best í sínum vanliga umhvørvi, og tey flestu vilja klára seg sjálvan sum longst, tí eiga eldri fólk at hava møguleika fyri sjálvi at taka støðu til, hvussu tey skulu búleikast á gamalsaldrinum. Hettar krevur, at heimahjálpin fær størri fíggjarliga játtan, at heimahjálparskipanin verður ment og víðkað, og at avvarandi, ið hava møguleika fyri at taka sær av sínum nærmastu, verða stuðlað av kommununi fíggjarliga.

Eldraíbúðir og vardar íbúðir skulu byggjast, fyri at fólk sum longst skulu kunna klára seg sjálvi og hava sítt egna. Tað eigur at verða stuðlað undir, at ellis- og røktarheim skullu kunna bjóða teimum gomlu, íð búgva í nærumhvørvinum, tær tænasturveitingar og ta hjálp, sum er fyri neyðini.

Men tá fólk gerast óhjálpin av sjúku- ella ellisávum, og tað ikki longur er forsvarligt at vera heima, eiga tey, sum eru gomul og sjúk, at hava rætt til eitt ellis- ella røktarheimspláss uttan at standa í bíðirøð.

Ikki so sjáldan kemur tað fyri, at fólk, ið hava verið innløgd á sjúkrahús, verða send heim, uttan at kommunan er før fyri at veita teimum ta neyðugu heimarøktina ella eitt umlættingarpláss.

Her er ein uppgáva, ið Tórshavnar kommuna eigur at taka í álvara, og kommunan eigur, umframt at styrkja heimarøktina, at skaffa fleiri umlættingarpláss og lata byggja tey ellis- og røktarheim, ið skulu til, fyri at nøkta tørvin.

Fyritreytirnar eru góðar, við tað at skattainntøkan hjá kommununi er vaksandi, og komunuskuldin er minkandi, og um fíggjakarmurin, ið er tengdur at eldraforsorgini fylgir við, og tær uppgávur, ið kommunan skal loysa, verða rætt raðfestar, tá megnar Tórshavnar kommuna at lyfta hesa uppgávu og kann geva okkara eldru og gomlu nøkur virðiligari ellisár eftir eitt ofta strævi arbeiðslív, har ikki øll hava havt eins góðar møguleikar fyri at tryggja sær ein góðan aldurdóm.

Tórshavnar kommuna er høvuðstaðarkommunan, har fólk flyta til, og har nógvar sosialar uppgávur eru at taka sær av. Neyðugt er tí við nýhugsan á tí sosiala økinum, og tíðin er búgvin til, at Tórhavnar kommuna fær eina serstaka høvuðsstaðarjáttan, soleiðis at ein størri partur av tí samlaða skattinum fer í kommunukassan, fyri at verða umsitin nærri borgaranum, enn hann verður í dag.

Eg vil tí arbeiða fyri at kommunan yvirtekur eldraforsorgina og fari at krevja størri fíggjarligara játtan til kommununa á tí sosiala økinum, fyri at fáa eina meira menniskjaliga sjúkra- og eldraforsorg, sum miðjar ímóti, at øll fáa ta hjálp, tey hava fyri neyðini, og sum vísir teimum eldru ta virðing, tey hava uppiborið, og sum gevur teimum veiku og sjúku betri liviumstøður.

# Stór framstig í Klaksvíkar Kommunu



**Elisabeth Joensen (Betta)**
*býráðslimur*

Hyggja vit aftureftir, er áhugavert at síggja tey framstig, sum Sambandsflokkurin hevur verið við til hesi seinastu 4 árini.

Skúlin á Ziskatrøð: Sitandi býráð hevur fingið gongd á eina stóra umvæling í skúlanum. Vit kunnu gleðast um tað, ið gjørt er, her eigur at verða hildið á, til bygningurin er sum nýggjur.

Skúlin við Ósánna: Hesin skúlin er yngri og í betri standi, tó er neyðugt við ábótum har eisini. Stórsti trupulleikin er, at skúlin er ov lítil. Kommunan keypti ognina norðanfyri frá Advokatfelagnum, og kann hesin bygningur nýtast til undirvísing og goymslu, meðan bíðað verður eftir nýggja skúlabygninginum, ið ætlanin er at byggja. Bert spell, at vit ikki enn hava kunnað sett pening av til nýggja bygningin. Tað eigur at verða gjørt so skjótt, sum til ber.

Barnaansingin: Stutt eftir at verandi býráð tók við, varð ein bólkur settur at útvega ansingarpláss, sjálv var eg við í hesum bólki.

Úrslitið varð, at vit fingu Mylnuhúsið, ið hevur 66 børn. Næsta stigið varð nýggi stovnurin við Kjalarvegin, ið letur upp í næstum, har pláss er fyri 48 børnum. Eisini hava vit fingið 40 børn afturat í Dagrøktini. Sosiala nevnd arbeiðir enn við eini loysn, tí bíðilistin er langur við sama lag.

Eldraøkið: Í hesum skeiði lat Sambýlið við Bøgøtu upp, og nú er spakin settur í undir Kráarbrekku, har farið verður í holt við at byggja eldraíbúðir og sambýli.

Fjálgalon: Stórur tørvur er á bústovni til fólk, ið ikki eru fullfør. Á Garðavegnum lat upp bústovnur fyri autistar, og nú verður nýggjur bústovnur bygdur.

Sosiala deild: Nógv arbeiði er innan sosiala økið. Barnaansingin er løgd út til kommunurnar, og møguliga koma onnur málsøki eisini. Nú er leiðari settur á Sosialu deild eins og barnaansingarsamskipari er settur.

Vatnútbyggingin: Tað var eitt stórt framstig, tá ið partur av býnum fekk sóttreinsað vatn úr Ánagjógv. Arbeitt verður nú við at seta upp reinsiverk við brunnarnar í Uppsølum, so um stutta tíð fáa allir borgarar sóttreinsað vatn.

Svimjihøllin: Neyðugt er at gera stórar umvælingar í svimjihøllini, sum fara at kosta nógvar pengar. Tíverri hevur ikki verið gjørligt at gjørt hesa høvuðsumvæling enn, tó eru umklæðingarrúmini umvæld, og fingu vit nýggjar brúsur, skáp, benkur og sólir.

Havnin: Eisini á havnaøkinum er nógv hent t.d. dýping á vágni, leingjan av Kósabrúnni, og arbeitt verður við góðshavn í Ánunum.

Ymiskt annað: Afturat hesum kann eg nevna, at í hesum skeiði eru vegir asfalteraðir, vegkantar gjørdir og gøtuljós sett upp. Vit hava fingið nýggjan vøll og skýlið. Eisini kann eg nevna Atlantis og tað, at vit hava fingið Granskingardepil fyri økismenning her norður eins og trygdarskeið.

Ikki smávegis framstig: Verandi býráð kann m.a. vísa á hesi mál, ið annaðhvørt eru framd ella skjøtil er settur á.

Hetta eru ikki smávegis framstig, tá ið hugsað verður um, at vit samstundis hava drigist við stóra skuld, sum vit hava megnað at goldið langt niður.

Alt hetta hevur borið til, tí at inntøkan hevur verið sera góð, og verða komandi árini eins góð og undanfarnu, skuldi borið til at gjørt tey arbeiði liðug, ið byrjaði eru og eisini farið í holt við annað, ið liggur á láni. Kanska verður tá eisini grundarlag fyri at seta skattaprosentið niður.

Eins og undanfarnu ár í samgongu, vil Sambandsflokkurin vera við til at skapa trivna og góðar umstøður fyri allar borgarar í kommununi.

# Íbúðarpolitikkur!



**Tórhallur Áslaksson**
*valevni Tjóðveldisflokksins*

Nógv mangla nakað at búgva í. Nógv mangla nakað ordiligt at búgva í. Nógv mangla eina hóskiliga íbúð, so tey kunnu selja síni ov stóru hús. Men her er onki at velja í!

Bíðilistin er langur og lýsingarnar nógvar í bløðunum um at fáa nakað at búgva í.

Hvar eru fakfeløgini í øllum hesum problematikkinum? Tað verða jú goldnar milliónakrónur í limagjaldi hvønn einasta mánað til tey ymsu fakfeløgini! Landsins kommunur hava frá fíggjarmálastýrinum fingið eina ávísa krónuupphædd at virka innanfyri, men vit fáa ikki bæði barnagarðar – íbúðir – gongubreytir – vegir – gongugøtir – blómukassar – og alt annað í senn. Men her kundu fakfeløgini stungi høvdini saman og brúkt pengarnar hjá limunum til nakað sum munar, nevniliga íbúðir til sínar limir og um so nakrar standa tómar, kunnu onnur eisini leiga seg inn.

Tjóðveldisflokkurin vil við leiðsluni í Tórshavnar kommunu arbeiða fyri at samtøk av hesum slagi fáa møguleika at gerða slíkar loysnir.

Set tí X við eitt av valevnunum á lista E, t.d meg!

# Smábarnafamiljurnar



**Charlotta á Váli Olsen**
*valevni Miðflokksins til Tórshavnar Býráð*

Sum so mong onnur eri eg í teirri støðu at hava stovnað heim og fingið tak yvir høvdið. Hetta at eiga sítt egna heim skuldi ikki verið nakað luksus. Vit føroyingar hava altíð mett tað sjálvsagt at seta fót undir egið borð.

Men soleiðis sum støðan er, er neyðugt hjá bæði manni og konu at arbeiða lønandi arbeiði fyri at kunna svara hvørjum sítt, tí at tað er so dýrt at seta búgv, tað vil siga hava tvær inntøkur.

Stuðulin, ið verður veittur foreldrum, ið hava børn síni í vøggustovum og barnagarðum, eigur at fylgja barninum, soleiðis at møguleikin eigur at standa foreldrunum í boði um tey ynskja at passa børn síni heima ella hava tey á stovni.

Sum býráðslimur ætli eg mær at arbeiða fyri at hesin møguleiki gerst veruleiki.

Vilt tú at hetta verður ein møguleiki, so fari eg at biðja um tína atkvøðu til býráðsvalið.